# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Realskúlaflokkur skúlaárið 1958/59

**Mynd frá ”Realskúlaframsýningini 1916-66”, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í summar. Myndin her er úr eini skúlastovu í Realskúlanum skúlaárið 1958/59**



*Aftasta rað (standandi inni við veggin) f.v.: Árni Joensen, Olaf Magnussen, Elin Hentze og Marianna Olsen.*

*Tey sum sita við skúlaborðini vinstrumegin (frá fremsta borði og aftureftir) Jane Retvig (sæst bara partvís), Brynhild Djurhuus, Majken Hentze, Rannvá Jacobsen, Øssur Berghamar, Jens Pauli í Dali og Poul Joensen.*

*Tey sum sita við skúlaborðini høgrumegin (frá fremsta borði og aftureftir) Gunnvør Egholm, Hella Djurhuus, Rolf Guttesen, Carl Johan Fossá, Effie Campbell og Olga Debes.*

*Næmingarnir sum ikki síggjast á myndini eru: Pauli Hansen, Viljólmur Christiansen, Torfinn Hentze, Erna Háberg, Marita Christiansen og Jórun Gunnarsson.*

*Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024.*

*Myndaeigari: Olga Kallsberg*

## Konsert í Vestmanna



*Hóskvøldið 24. januar hevur Heiðrikur á Heygum konsert í ungdómshúsinum »Staðið« í Vestmanna. Heiðrikur, ið er hálvur vestmenningur, gav stutt fyri jól út elektronisku fløguna »An Invisible Gun«. Konsertin byrjar kl. 20.*

### Dagurin

**25. januar. Pálsmessa.** Verður hildin til minnis um umvending Paulusar á leiðini til Damaskus í árinum 36. Á pálsmessu koma súlan og lomvigin at landi. Súludagurin er hátíðardagur í Mykinesi, og í eldri tíðum varð dansað har henda dagin . Erlendur biskupur var bispvígdur hendan dagin í 1269.

†

### Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Ritu Bech** úr Lopra fer úr kapellinum á Suðuroyar sjúkrahúsi fríggjadagin klokkan 19. Jarðarferðin verður úr Bethel í Vági leygardagin klokkan 13.

**Hans Toftheyggj** í Hvalba andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi týsdagin, 78 ára gamal. Farið verður úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjadagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Hvalbiar kirkju leygardagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Hans kunnu lata Hvalbiar kirkju eina gávu.

**Martin Heinesen**, fyrrverandi skipari, í Klaksvík andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mánadagin, 89 ára gamal.

### Tøkk

Eg vil takka øllum, sum mintust meg á 95 ára degnum tann 12. januar 2008. Ein serstøk tøkk til starvsfólkið á Árgarði, sum gjørdu mær dagin so hugnaligan.

Kærar heilsur og gott nýggjár.

**Sigrid Nicodemussen**
fyrrverandi jarðarmóður
Sandur




Haldið Sosialin!

**Ja takk!** Eg ynski at tekna meg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið borið út 5 ferðir um vikuna

**Tekna teg sum haldara nú fyri einans**
**450,- um ársfjórðingin**
**Sparið 395,-** í mun til leysasølu!

Navn:
Bústaður:
Bygd / býur:
Telefon:
Undirskrift:

**Send lepan til:**
Sosialurin
Boks 76
FO-110 Tórshavn